# Norðuratlantsbólkurin

**Zakarias Wang**

Valdagurin 8. februar 2005 gjørdist ein merkisdagur í føroyskari søgu.

Í 1947 fekk danska stjórnin kong at áseta, at føroyingar skuldu velja tvey umboð á fólkating.

Orsøkin var einføld. Eftir fólkaatkvøðuna tann 14. september 1946 samtykti Føroya løgting (Fólkaflokkurin við 11 monnum saman við einum javnaðarmanni, sum varð ekskluderaður) at fólkaatkvøðan skuldi setast í verk, so Føroyar gjørdust eitt sjálvstøðugt ríki í Evropa. Tá fóru Javnaðarflokkurin og Sambandsflokkurin við rin og hvin og forklagaðu løgtingsmeirilutan fyri tí donsku stjórnini. Teir bóðu hana vælsignaða um at leggja upp í føroysk innanhýsismál og senda løgtingið til hús. Hetta gjørdi stjórnin fegin.

Á ríkisdegi vóru tvey umboð fyri Føroyar. Annað sat í landstinginum og var valt av Sambandsflokkinum og Javnaðarflokkinum í løgtinginum. Hitt umboðið var á fólkatingi, og tað varð valt av Føroya fólki. Formaður Fólkafloksins Tórstein Petersen var hann, ið var valdur. Fólkatingið hevði meir vald enn landstingið, sum tað var upp á tal at avtaka. Tí helt stjórnin, at tað var umráðandi at fáa eitt umboð afturat úr Føroyum, sum tók undir við stjórnini og hennara uppílegging í føroyskan politikk.

Hetta hevur eydnast sera væl, og til hvørt einasta val síðani hava annaðhvørt Javnaðarflokkurin ella Sambandsflokkurin og viðhvørt báðir í senn havt umboð á fólkatingi.

Líka til nú!

Týsdagin tann 8. februar hendi undrið.

Hvørgin av teimum flokkunum, sum í 1946 fingu donsku stjórnina at leggja seg út í føroyskan politikk, fingu nakað um-



boð.

Hetta er tí ein heilt nýggj støða, sum er íkomin.

Hvat er tað rætta at gera tá so liggur fyri?

Ein fyrimynd kundi verið at gjørt sum íslendingar gjørdu, tá teir í 1848 fingu 5 umboð á tjóðfund dana, tað grundlógargevandi ríkistingið. Teir tóku við hesum sessum, og við Jóni Sigurðsyni á odda møttu teir upp.

Men teir søgdu einki. Hetta var tí, at teir høvdu fingið eina tilsøgn um, at teir sjálvir skuldu gera av, hvat ið skuldi henda við Íslandi, og tí var tað í Íslandi, teir skuldu viðgera stjórnarskráarmálið. Ein av teimum dittaði sær til at bróta hesa semju og tók einaferð orðið. Hann noyddist at flyta úr Íslandi og setti búgv í Ålborg (Álaborgarjón). Hinir tagdu, og tá málið kom fyri á tí íslendska tjóðfundinum mótmæltu teir (næstan) allir, at teir allíkavæl ikki sluppu at taka nakra avgerð í málinum.

Men er støðan hjá okkum ikki mestsum tann sama sum hjá íslendingum tá?

Vit hava eins og grønlendingar fingið at vita, at vit sjálvi skulu taka avgerðir í teimum týdningarmiklu málunum, sum standa fyri framman, nú Danmark skal gerast ein partur av tí evropeisku uniónini.

Er tað nøkur grund til annað enn at okkara fremmandarbeiðarar á fólkatingi standa saman um tað eina málið, at tað er her hjá okkum, avgerðirnar skuldu takast?

Sjálvt Javnaðarflokkurin boðaði fyri valið frá, at hann fegin vildi vera við í hesum samstarvi. Í veruleikanum er ringt at síggja hví Sambandsflokkurin og Fólkaflokkurin ikki skuldu gjørt tað sama.

Sjálvandi hevur tann maður, sum sambandsmenn hava valt á fólkating, altíð verið limur í Vinstraflokkinum, men so hevur ikki verið við teimum umboðum, sum Sambandsflokkurin hevur havt í landstinginum. Ein av stovnarum floksins og fyrsti formaðurin var í bólki saman við Høgraflokkinum í landstinginum, og tann sambandsmaður, sum 1936-53 sat í landstinginum, var limur í Sosialdemokratiska flokkinum. Teir sambandsmenn, sum hava sitið á fólkatingi, hava verið í Vinstra, men hava ikki viljað verið við til at felt nakra sosialdemokratiska stjórn sjálvt um Vinstra hevði havt møguleika fyri tí við teirra stuðli.

Fólkaflokkurin hevur ofta havt umboð á fólkatingi. Tórstein var greitt fyri tí at avgerðir skuldu takast í Føroyum, so yvirhøvur møtti hann ikki upp har og fór so langt, at hann ikki vildi geva tað hátíðarliga lyftið um at halda donskur stjórnarskránna, sum nývaldir fólkatingslimir skulu geva. Tá vóru góð ráð dýr hjá dønum, og teir funnu uppá at siga, at av tí at hann hevði stillað seg upp til valið hevði hann harvið góðkent stjórnarskránna og slapp hann tí at sita í sessinum. Annars møtti hann bara upp til at røða ímóti og atkvøða nei til heimastýrislógina.

Heldur ikki Hákun, Poul Adrian ella Óli hava verið limur av nøkrum donskum flokki.

Tað hevði tí verið í besta samsvari við politikk Fólkafloksins á fólkatingi at verið við í Norðuratlantsbólkinum, sum sjálvandi hevði verið broyttur av tí at Fólkaflokkurin kom uppí.

Hvat hevði yvirhøvur verið til hindurs fyri at Norðuratlantsbólkurin gjørdist samdur um at brúka sama taktikk sum Jón Sigurðsson og hansara menn nýttu í 1848: Tiga og ikki leggja seg upp í danskan innanríkispolitikk, men vera á varðhaldi og tala at, um danska stjórnin fer um mark og leggur seg upp í okkara innanhýsisviðurskifti?

---

*Framhald av síðu 11*

um. Sjálvt um øll okkara úrslit soleiðis eru vorðin mett av øðrum, er tað sjálvsagt ikki nøkur trygd fyri, at vit ikki hava mistikið okkum. Strevanin hjá einum hvørjum vísindafólki er at vinna fram á sannleikans vegi. Tí eru kvalifiseraðar atfinningar altíð vælkomnar, so mistøk kunnu rættast.

Vísindaligar atfinningar og atfinningar frá áhugabólkum er tó ikki tað sama. Vit vita væl, at tað verður tungt hjá mongum at skula ásanna, at tað, sum menniskjuni tola av kviksilvuri, tykist at minka, tí hetta hevur við sær ógvuliga stórar útreiðslur fyri samfeløgini, bæði tað privata og tað almenna. Tann vísindaligi kritikkurin hugsar tó ongantíð um avleiðingarnar, hann skal bara hugsa um tað reint vísindaliga, hvat er rætt, og hvat er rangt. Konstruktivar atfinningar eru kærkomnar - tað er jú betur at rætta mistøk í samtíðini, enn at eftirtíðin ger tað. Kravið er bert, at tað eru vísindaligar atfinningar og ikki bert tómt tos og brigsl.

**Stórt og smátt í fólkaheilsuhøpi**

Í greinini, har starvsfelagi mín skírir úrslitið av kviksilvurkanningunum í Føroyum fyri at vera møsn, verður eisini komið inn á, hvat er týdningarmikið í fólkaheilsuhøpi. Hetta er eitt heilt annað prát, sum eg partvís eri samdur í. Hyggja vit at heilsuni hjá børnum í Føroyum sum heild, kunnu vit taka okkurt av úrslitinum av kanningararbeiðum her á Deildini fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu.

Vit hava leingi víst á, at børn í 9. flokki í Føroyum roykja meira enn onnur børn í Evropa, og vit hava eisini víst á, at ein rættiliga stórur partur av teimum viðhvørt hevur tað so ringt við seg sjálvan, at tey vildu sloppið av verðini. Hetta fyribrigdi síggja vit eisini í amerikanskum og evropeiskum skúlakanningum.

Vit hava eisini víst á, at BMI (Body Mass Indeks) hjá 14 ára gomlum, tvs. likamsvekt í mun til hædd, er áleið tað sama sum í øðrum evropeiskum londum, t.d. Italia, Kypros, Svøríki og Danmark. Úr Danmark vita vit, at BMI er vaksið týðiliga hesi seinnu árini. Sjálvt um sami vøksturin ikki er prógvaður í Føroyum, er sannlíkt, at gongdin er tann sama hjá okkum.

Sæð frá einum fólkaheilsusjónarmiði eru nógv onnur heilsulig fyribrigdi, sum hava størri týdning enn kviksilvureitran, t.d. royking, lítil rørsla og fiti. Fyribyrgjandi arbeiði á hesum umráðum hevur tó einki at gera við, at kvinnur, sum eru við barn, halda seg til kosttilmælini, sum føroyskir heilsumyndugleikar hava givið um kviksilvur og sum ljóða soleiðis um tvøst og spik:

**Tvøst**

Vegna høga innihaldið av kyksilvuri í tvøsti verður mælt til, at vaksin fólk ikki eta meira enn 1-2 grindadøgurðar um mánaðin og børn ikki meira enn 1 ferð um mánaðin.

Kvinnur, ið ætla at gerast við barn innan 3 mánaðir, barnakonur og kvinnur, ið hava barn at brósti, eiga helst einki grindatvøst at eta.

Mælt verður til, at føroyingar hava hesi viðurskifti í huga:

- Tungmetalið kyksilvur hópast upp í føðiketuni og hjá tí einstaka menniskjanum.
- Fostur og møguliga eisini smábørn eru serliga viðkvom fyri kyksilvuri.
- Fostrið fær kyksilvur úr blóðinum hjá mammuni.
- Lívrunnið kyksilvur í blóðinum minkar til helvtar eftir eini 3 mánaðum, um onki kyksilvur verður etið.
- Bróstamjólk inniheldur eisini fitt av kyksilvuri.

**Spik**

Vegna høga innihaldið av PCB'um í spiki verður mælt til at avmarka spiknýtsluna. Vegna illgruna um eitrandi árin á m.a. nervalag og kynsgøgn hjá børnum í móðurlívi, verða tað gjørdar nágreiniligar kanningar av føroyskum nýføðingum. Enn eru hesar kanningar komnar ov stutt til at bera eitt ítøkiligt kosttilmæli, men mælt verður føroyingum til at hava hesi viðurskifti í huga:

- Summi mannskapt evni, sum PCBir, verða goymd í kroppinum alt lívið og hópast tískil upp. Fostrið fær hesi evni úr nalvastronginum, nýfødda barnið við móðurmjólkini og síðani við at eta spik.
- Um PCB innihaldið í kroppinum skal vera lágt, tá kvinna er við barn, er neyðugt at spiknýtslan undanfarin ár hevur verið lítil.
- Besti mátin at verja fostrið móti teimum skaðiligu árinum, sum illgruni er um, er at kvinnur halda seg heilt frá at eta spik til tær hava átt børnini.

Føroyingar eru í teirri hepnu støðu, at dálkingarkeldurnar eru at finna í tvøsti og spiki í grindahvali. Minka vit um tað, kunnu vit basa kviksilvurtrupulleikanum skjótt, meðan tað tekur mong ár at minka um eiturevnini í spikinum, sum niðurbrótast spakuliga. Eftir mínum tykki er einki læknaligt, sum talar fyri, at tey kosttilmælini, sum givin eru, skulu linkast, heldur tvørturímóti, tá nýggjastu granskingarúrslitini verða havd í huga.

Undirritaði hevur luttikið í orðaskiftinum um dálkaðan mat og kosttilmæli í flestu londum kring Norðurpólin. Hesar tjóðir eru nógvastaðni í eini truplari støðu, tí gevast tey, t.d. í Qaanaaq í Norðurgrønlandi, at eta tann matin, sum tey veiða, er grundarlagið burtur undir teirra tilveru. Soleiðis er ikki í Føroyum. Tey, sum minka um grindadøgurðarnar, nýtast ikki at ganga svong, tí fiskurin í havinum kring Føroyar er als ikki dálkaður í sama mun. Í fiskinum eru tær ómettaðu feittsýrurnar, og fiskur er góður og sunnur matur.

Tað skal verða mítt tilmæli, at vit eta meira fisk, minka um grindina og gera umheiminum greitt, at tey hava dálkað okkara yndismat, soleiðis at børn okkara eru hótt.

Lat meg enn eina ferð nýta høvi at takka øllum teimum, sum hava brúkt tíð og orku í hesum kanningum, tað veri seg børn, foreldur ella starvsfólk. Tit hava verið við til at verja land og fólk móti sníkjandi kemiskum ágangi, og tit eru við til at gera okkara lítla land sjónligt úti í heimi.

**Nøkur orð um samstarv**

Nútímans gransking fer fram í samstarvi millum einstaklingar, millum stovnar og millum lond. Innan kviksilvurgranskingina hava tað verið tríggjar meginkanningar, sum myndugleikarnir úti í heimi hava brúkt, tá teir skuldu meta um kviksilvursporningin. Vit í hesum granskingarhópum kenna og vitja hvønnannan, og eitt støðugt orðaskifti er okkara millum. Viðhvørt hvassorðað, men altíð á fakligari grund. Í hesum sambandi skal eg siga, at enn er eingin, sum hevur ávíst álvarslig brek við okkara kanningum. Men tað eru tey, sum føra fram, at tað, vit síggja í Føroyum, ikki bara er eitt kviksilvurárin, men eisini árin av PCB. Vit halda hinvegin, at PCB árinið á heilan er nógv minni, men at PCB hevur onnur skaðilig árin. M.a. á immunverjuna og hormonskipanina.

**Framtíðin**

Herfyri legði løgmaður fram sínar visiónir um Føroyar, sum eitt samfelag, ið um fá ár er grundað á kunnleikaframleiðslu. Hesum eri eg púra samdur í, men tað hevur við sær, at vit øll, hvør í sínum lagi, gera tað, sum vit megna, tí akrarnir eru stórir og bønarmennirnir fáir í okkara lítla landi.

Eftir mínum tykki eru nógv øki - eisini innan føroyska heilsuverkið - sum møguleikar eru fyri at granska í, bæði innan sjúkrahúsgátt, í primeru heilsutænastuni og innan fólkaheilsu. Megni eg tað, leggi eg fegin lag á. Eisini starvsfelaga mínum úr Klaksvík.

Latið okkum - í staðin fyri at keglast - byggja eitt Alhambra her úti í Norðurhøvum.

**Tilvísingar:**


2. Environmental Health Criteria 1, Mercury, World Health Organization, Geneva 1976.
3. http://ntp.niehs.nih.gov/ index.cfm?objectid=03614B65-BC68-D231-4E915F93AF9A6872
4. http://www.nap.edu/openbook/0309071402/html/
5. http://www.dadlnet.dk/ufl/2003/0302/VP-html/VP34994.htm
6. http://www.inchem.org/documents/jecfa/jeceval/jec_1307.htm